Landsbyggifelagið P/F søkir royndan bygningsverkfrøðing

Vit sóknast eftir einum fólki við førleika til at arbeiða sjálvstøðugt innan vanligu byggi- og anleggsfakini, at byrja skjótast til ber

Nærri fæst at vita við at ringja til tlf. 314744.

Umsóknir skulu sendast til
Landsbyggifelagið P/F
Grønlandsvegur 5
Postsmoga 228
FO-110 Tórshavn

Býargartnari í Klaksvík

Í sambandi við at nógv hevur verið gjørt í býnum seinnu árini, og at arbeiðið ætlast økt, verður søkt eftir býargartnara til Klaksvíkar kommunu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv í 17. lønarflokki sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri.

Starvsøkið er:
- framhaldandi fríðkan av býnum og at halda verandi økir.
- at skipa nýggj fríøkir í kommununi.
- at halda býarhegnið, so seyður o.l. ikki kemur inn í býin.
- v.m.

Arbeiðið er sjálvstøðugt.

Umsøkjarar skulu hava bókliga og praktiska útbúgving innan gartnarayrki.


Umsóknir verða at senda til:

Klaksvíkar Býráð
Postsmoga 2
700 Klaksvík

í seinasta lagi 31. august 1998.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til býarverkfrøðingin ella býráðsskrivaran, tlf. 456388.

Klaksvíkar Býráð



BLANDIMASKINUR

Effektivar - lætt handfarandi og robustar blandimaskinur í std. 125 - 140 - 160 litur eru á goymslu.
Umframt hesar útvega vit aðrar std. og modell eftir ynski.

P/f Kaj Andreasen & Co.
Klingran 5 • 188 Hoyvík
Tlf 31 56 00

Læruplass/ lærimeistarar

Mint verður á, at tann, ið umhugsar at taka lærling í læru, skal í góðari tíð frammanundan gera skrivligan lærusáttmála, sum greitt tilskilar nær læran byrjar, og nær hon endar, og skal sáttmálin góðtakast av fútanum.

Loyvt er ikki at hava ungfólk í læru 'uppá prøva', áðrenn lærusáttmáli verður skrivaður. Ei heldur hava ungfólk, ið ikki hava góðkendan lærusáttmála, loyvi at arbeiða fyri lærlingaløn. Fyri handverkslærlingar eru fyrstu 12 mánaðirnir av lærutíðini at rokna sum royndartíð. Á skrivstovu og í handislvinnu er royndartíðin, sambært lærlingalógini, 6 mánaðir.

Brot á hesa fyriskipan kann koma undir sekt til landskassan.

Føroya Læruráð

Tekniski Skúlin í Tórshavn

søkir avloysara fyri

húsa- og náttarvørð til Skúlaheimið

Fyri ein av verandi húsa- og náttarvørðum skúlans, sum er í farloyvi, verður søkt eftir avloysara.

Starvið er partur av eini vaktarskipan við 2-skiftisvakt.
Á dagvaktini umfatar arbeiðið alt fyrifallandi húsavørðsarbeiði á skúlaheiminum, meðan tað á náttarvaktini fyrst og fremst er at hava eftirlit við virkseminum á heiminum eins og at hjálpa og leiðbeina tey búgvandi í fyrispurningum; umframt at taka sær av bráðkomnum húsavørðsarbeiði.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv, helst sum húsasmiður, bygningssnikkari ella líkandi útbúgving. Eisini skal viðkomandi hava ávísan førleika til at umsita hitaverkið. Herumframt skal umsøkjarin hava í minsta lagi 3 ára starvsroyndir aftan á lokna útbúgving.

Við atliti til náttarvørðsarbeiðið skal viðkomandi eisini hava hegni og myndugleika at fara um tann ungdómin, sum býr og kemur á Skúlaheimið.

Starvið verður sett frá 10. aug. 98 til 1. mars 99.


Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Handverkarafelag.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmæli og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. aug. Umsóknin skal vera merkt »húsa- og náttarvørður«

TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN
Marknagilsvegur 75 · P.o.b. 239
FO-110 Tórshavn

Haldið **sosialin**

Dekkarar



Hervið verður søkt eftir 4 dekkarum til

M/F NORRÖNU,

at byrja skjótast tilber.

Fyri at verða settur í starv krevst:
- Góðkent heilsuprógv fyri sjófólk
- Lokið brandskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Trygdarskeið
- Skikkaður til kagtænastu, góðkendan sýnsprøva og hoyriroynd ikki eldri enn 3 ár.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

P/F SMYRIL LINE
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

Landssjúkrahúsið

FO-100 Tórshavn

Sjúkrasystrar

Tvey størv sum ábyrgdarhavandi sjúkrasystrar eru leys til setan skjótast gjørligt.

Eina starvið er í náttarvakt 6 nætur aðru hvørja viku - starvsbrøkur 0,6 og hitt er í dagvakt annað hvørt vikuskifti, leygardag og sunnudag kl. 8.00-16.00 og náttarvakt sunnunátt og mánanátt kl. 23.30-7.30 - starvsbrøkur 0,4.

Størvini fevna um at hava yvirlit yvir allar somatiskar deildir á Landssjúkrahúsinum, móttaka akutt innlagdar sjúklingar og at arbeiða á skaðastovuni.

Umsøkjarar skulu hava hollar royndir innan sjúkrarøkt.

Løn- og setanartreytir smb. sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bergliot Ihlen, fyristøðukvinnu, tlf. 313540, lokal 127.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og frágreiðing um fyrrverandi størv verður at senda til Almanna- og Heilsumálastýrið, Starvsfólkadeildin, Eirargarður 2, 100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 17. august 1998.